# Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til ein 5 ára gamlan drong í Runavíkar kommunu, at byrja 13 august 2007. Starvið er tíðaravmarkað í 3 mánaðir við møguleika fyri at verða longt.

Arbeiðið hjá stuðlinum er í samstarvi við familjuna og Barnagarðin á Mýrunum at ansa og vera um dreingin.

Drongurin hevur trupulleikar við atferð og integratión og hevur tí ikki gott av at vera á dagstovni. Drongurin megnar tó at verða ansaður í einum heimligum umhvørvi saman við einum vaksnum.

Arbeiðstíðin er 35-40 tímar um vikuna.

Sosiala deild skipar fyri, at stuðulsfólkið fær supervisión og ráðgeving eftir tørvi.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Eyðnu Norðfoss, barnagarðsleiðara á tlf. 448254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður at senda Runavíkar kommunu í seinasta lagi 11.07.2007

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
600 Saltangará

# Koyri-kort?

Teoriskeiðið til persónbil, byrjar mánadagin **9. juli** **kl. 17.00**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Rúni Christiansen
tel 214765

John A. Christiansen
tel 21 47 75

Stanley A. Olsen
tel 211099

Jekaragøta 10 • Tórshavn




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## LÆRARAR TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

Søkt verður eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 vegna niðursett tímatal og avlopstímar. Starvið er uml. fult starv, men tímatalið verður endaliga ásett 1. sept. 2007.

Starvið verður sáttmálasett.

Í Kollafjarðar skúla ganga komandi skúlaár uml. 140 næmingar í 1. til 9. flokki.

17 lærarar fara at starvast í skúlanum.

Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum.

Vit arbeiða í trimum deildum við einum læraratoymi í hvørjari deild.

Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.

Vit arbeiða støðugt við at menna skúlan, og vit sóknast eftir lærarum, ið eru eldhugaðir, samarbeiðshugaðir og fakliga dugnaligir.

Vit hava ein lærarahóp, ið røkkur fakliga víða. Vit hava brúk fyri at seta lærarar við ymiskum førleikum.

Tann, ið settur verður, skal hava lærarаútbúgving. Tó kann annað fólk verða sett, um eingin lærari søkir.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, verður at senda til:

**Kollafjarðar skúla**
Botnavegur 2
FO-410 Kollafjørður

í seinasta lagi fríggjadagin 13. juli 2007 kl. 12.00.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlaleiðaran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á teldupostbústaði karin.hammer@skulin.fo

Eurest
P/F Eurest Føroyar

## Reingerðarfólk

Vit sóknast eftir reingerðarfólkið sum feriuavloysarar og til at seta í fast starv at byrja sum skjótast.

Um hetta hevur tín áhuga, so vinaliga ring til Símun Midjord á tlf. 228915.

# Lutir í konkursbúgvi til sølu

Við hesum verða fylgjandi lutir hjá Sp/f El og Automatik í konkurs, 900 Vágur, lýstir til sølu:

- Ein vøruvognur av merkinum Ford Escort, árg. 2000,
- Ein vøruvognur av merkinum WV LT28,
- Ymisk handverkaramboð,
- El-amboð til nýtslu í sambandi við el-instalatørarbeiði, t.d. mátitól, byggistreymstalvu o.l.,
- Ymisk innbúgv og skrivstovuútgerð og
- Vørugoymsla.

Nærri upplýsingar um lutirnar, ið eru lýstir til sølu, fáast við at venda sær til Jóhan J. Lamhauge, advokat, jjl@lawfirm.fo ella Sigrid Midjord, skrivara, sm@lawfirm.fo, ella við at venda sær til heimasíðu okkara www.lawfirm.fo.

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# ÚTBJÓÐING

Vegna Fuglafjarðar kommunu verður arbeiðið viðv. flutningi av gróti boðin út í almennari lisitatión.

Flytast skulu uml. 120.000 tons av gróti frá Hústoft til havnalagið í Fuglafirði.

Roknast skal við at dagliga verður koyrt 10 tímar, og at flytast skulu 1.000 tons um dagin. Grótflutningurin byrjar í viku 30. ár 2007.

Lessing og planering á móttøkustaðnum er ikki við í tilboðnum.

Tilboð merkt »Grótflutningur til havnalagið« skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 12. juli 2007 kl. 11.00. teir ið boðið hava kunnu verða hjástaddir.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Pætur Joensen,. Tlf. 737700 ella 737705 patur@fuglafjordur.fo

*Fuglafjørður 03. juli 2007*

**Fuglafjarðar kommuna**
Tekniska deild